Heilsustýrið

# Kravfesting fyri heimasíðu hjá Heilsustýrinum

GG. Fólkaheilsustýrið hevur júst skift navn til Heilsustýrið.

Heilsustýrið skal hava nýggja heimasíðu í staðin fyri verandi síðu, sum er ein fyribilsloysn frá 2023, tá Heilsustýrið fór at virka.

## Endamál við heimasíðu

Høvuðsendamálið við nýggju heimasíðuni er at veita tíðindi, kunning, vegleiðing og dátur um heilsuviðurskifti í Føroyum. Heimasíðan skal vera fremsti pallurin, føroyingar leita sær til fyri at fáa dagførda og álítandi vitan um heilsuviðurskifti í Føroyum.

Av tí at Heilsustýrið er ein nýggjur stovnur, sum framvegis veksur og fær tillutað nýggjar uppgávur, er neyðugt eisini at hava í huga tað virksemið, sum í næstum fer at verða lagt til stovnin, tá heimasíðan verður ment. M.a. skal heimasíðan hava møguleikar fyri góðari sambinding til aðrar skipanir so sum Talgildu Føroyar o.a.

Tørvur er á einari tíðarhóskandi heimasíðu, sum tekur støði í gerandisdegnum og miðlavanunum hjá fólki í dagsins samfelag. Heimasíðan fer at vera rúgvusmikil við nógvum kunningartilfari á. Tí er ógvuliga umráðandi at hava ein greiðan og logiskan bygnað av síðuni, og tað skal vera lætt hjá brúkarunum at finna runt. Ein góð leitifunka er eisini avgerandi fyri, at brúkarin skal finna tað, hann leitar eftir.

Sum frálíður verða nógvar frágreiðingar (rapportir) tøkar hjá fólki, og hesar skulu skipast í eitt savn. Umráðandi er eisini, at savnið skal skipast soleiðis, at til ber á lættan hátt at leita í savninum.

## Um Heilsustýrið

Heilsustýrið varð sett á stovn 1. jan 2023. Talan er um eina samanlegging av virkseminum hjá trimum eindum: Fólkaheilsuráðnum, Ílegusavninum og Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Stovnurin virkar við heimild í løgtinslóg nr. 77 frá 6. mai 2022 um Heilsustýrið.

Heilsustýrið skipar heilsufakliga økið í Føroyum og veitir granskingargrundaða ráðgeving við støði í føroyskum heilsu- og samfelagsviðurskiftum. Málið er at fáa yvirlit, kunnleika og byggja upp eitt grundarlag fyri heilsufremjandi átøkum. Stovnurin stendur fyri upplýsing og tiltøkum um fólkaheilsu sum heild, og umsitur heilsufremjandi og fyribyrgjandi partin av arbeiðinum við fólkaheilsu.

Heilsustýrið mennir og viðger hagtøl, eins og greiningar og heilsufrágreiðingar verða gjørdar. Stýrið mennir og umsitir heilsuskráir, m.a. FarGen, Ættarbandsskránna og eina nýggja landssjúklingaskrá, og viðger umsóknir um loyvi til at granska í skráunum.

Heilsustýrið umsitur tilbúgvingina í føroyska heilsuverkinum og ger vegleiðingar til heilsulóggávu og tilmæli til myndugleikar og stovnar.

## Um okkum

Í løtuni starvast 20 fólk í Heilsustýrinum, sum er skift sundur í fýra eindir: Stjórn, fyrisiting, fólkaheilsa og heilsudátur. Harumframt er eisini ein eind, sum eitur "Tilbúgving", og í løtuni er stjórin einasta umboð fyri stovnin í hesi eindini saman við eksternum serfrøðingum. Talan er um ein stovn, sum skal mennast og er í vøkstri, og innan fá ár verður starvsfólkahópurin styrktur munandi.

## Missión og visjón

Vit vilja vera "*Top of mind*" hjá føroyingum, tá tað snýr seg um vitan um heilsu í Føroyum.

Vit hava ikki arbeitt við at orða eitt ítøkiligt virðisgrundarlag, missión og visjón, men innanhýsis er semja um, at endamálið við okkara arbeiði er: at *fremja heilsuna hjá øllum í Føroyum*.

Fyri okkum hevur týdning, at vit arbeiða ábyrgdarfult, við gjøgnumskygni og við støði í gransking. Vit hava høgar ambitiónir og leggja stóran dent á samstarv við aðrar stovnar – innan- og uttanlands.

## Samanrenning og nýbygging

Sum áður nevnt tekur virksemið hjá nýggja Heilsustýrinum støði í virkseminum hjá samanløgdu stovnunum, og tí kunnu hesar heimasíðurnar nýtast til íblástur, tá nýggja síðan verður ment:

- Heilsustýrið www.hst.fo
- Ílegusavnið www.biobank.fo
- Fólkaheilsuráðið www.folkaheilsa.fo
- FarGen (Ílegusavnið) www.fargen.fo

Umframt virksemið hjá fyrrverandi stovnunum liggja aðrar, nýggjar uppgávur hjá Heilsustýrinum nú. Stovnurin umsitur uppgávur, sum samsvara við uppgávur hjá fleiri ymsum donskum stovnum, og í framtíðini leggjast fleiri øki afturat. Hesir stovnar fevna í løtuni um:

- Sundhedsstyrelsen www.sst.dk
- Sundhedsdatastyrelsen www.sundhedsdatastyrelsen.dk
- Nationalt Genomcenter www.ngc.dk
- lutvíst Landslæknanum www.landslaeknin.stps.dk
- lutvíst Statens Institut for Folkesundhed www.sdu.dk/da/sif
- lutvíst Statens Serum Institut www.ssi.dk

## Málbólkar og tørvur

Stavnhaldið hjá Heilsustýrinum er at fremja heilsuna hjá øllum í Føroyum, og tí vendir heimasíðan sær breitt til allar føroyingar. Vit leggja okkum eftir at hava eina heimasíðu, sum veitir tíðindi, kunning, vegleiðing, tilmæli, dátur og hagtøl um heilsu, sjúku og tilbúgving í Føroyum. Yvirskipað er tankin at skipa heimasíðuna í tveir høvuðsbólkar: *Borgari* og *Fakfólk*. *Borgari* vendir sær til teirra, sum í sínum privatlívi hava tørv á vitan um heilsu. *Fakfólk* vendir sær til teirra, sum í sambandi við sítt starv/virki hava tørv á vitan um heilsu.

Dømi um brúkarar og tørv:

***Tann forvitna/forvitni/zapparin (Borgari):***

Tørvur: tíðindi, átøk, kunning/tilmæli, frágreiðingar

***Foreldur/avvarðandi (Borgari):***

Tørvur: átøk, kunning/tilmæli, vegleiðingar,

***Ungfólk/skúlanæmingar (Borgari):***

Tørvur: átøk, kunning/tilmæli, undirvísingartilfar (td. media), vegleiðingar, um stovnin

***Tilflytari (Borgari):***

Tørvur: EN: kunning/tilmæli, vegleiðingar

***Heilsustarvsfólk (Fakfólk):***

Tørvur: (FO+EN) vegleiðingar, mannagongdir, skjøl/oyðubløð, skráir, hagtøl, tíðindi, *Fá tíðindabrøv*

***Umboð fyri stovnar, kommunur, feløg (áhugafelagsskapir, ítróttarfeløg, sjúklingafeløg) (Fakfólk):***

Tørvur: vegleiðingar, átøk, kunning/tilmæli, undirvísingartilfar (átøk), um stovnin, *Fá tíðindabrøv*

***Granskarin (Fakfólk):***

Tørvur: skráir, hagtøl, mannagongdir, vísindaligar greinar, frágreiðingar, *Fá tíðindabrøv*

***Miðlar/politikarar/myndugleikar (Borgari + Fakfólk):***

Tørvur: tíðindi, hagtøl, frágreiðingar, kunning/tilmæli, um stovnin, *Fá tíðindabrøv*

## Snið og funktionell/tøknilig krøv til heimasíðu

| | |
|---|---|
| Umsiting | Heimasíðan skal verða einføld og intuitiv at umsita. Ofta verða tekstir skrivaðir í øðrum forritum sum word, pages, outlook ella øðrum fyrst og tað skal vera einfalt at copy/paste inn í heimasíðuskipanina uttan at fontar o.a. fara út av lagi.<br>Møguleiki skal vera fyri at tíðaráseta nær tilfar verður alment. |
| Borgari/Fakfólk | Yvirskipað er tankin at skipa heimasíðuna í tveir høvuðsbólkar: *Borgari* og *Fakfólk*. Borgari vendir sær til teirra, sum í sínum privatlívi hava tørv á vitan um heilsu. Fakfólk vendir sær til teirra, sum í sambandi við sítt starv/virki hava tørv á vitan um heilsu. |
| Serligur tørvur | Atlit skulu takast til serligan tørv, t.d. skermlesari til fólk við tarni eins og løtt navigatión. |
| Kagar | Heimasíðan skal rigga á øllum teim vanligu kagunum, so sum: Chrome, Firefox, Microsoft Edge, Safari o.s.fr. |
| Sambinding | Heimasíðan skal virka væl at sambinda við aðrar skipanir, t.d. Talgildu Føroyar, innritan (sundhed.dk), sjálvgreiðslur o.a. |
| Versionering | Ensk spegling ella tillaging. |
| Responsivt snið | Responsivt snið er sjálvsagt eitt krav. |
| Myndir | Heimasíðuskipanin skal hava møguleika fyri sjálvvirkandi skering av myndum. Støddin á myndunum skal tillagast av sær sjálvum, so ferðin á síðuni er sum frægast. Umsitari skal kunna velja fokuspunkt á myndini. |

| | |
|---|---|
| Átøk | Heimasíðan skal kunna vísa møgulig átøk hjá Heilsustýrinum á forsíðuni. |
| Leitifunka | AI-leitifunka er ynskilig. |
| Tags | Tags – leitiorð, sum umsitari ásetir fyri tekstir, so lætt er at finna kunning og tíðindi um ávís evni í leitifunkuni og til sortering. |
| Infoboksir | Grafiskt skal bera til at seta infoboksir/Góð ráð inn, sum grafiskt bróta frá restini av tekstunum. |
| Tíðindabræv | Ein funka skal vera, har til ber at tekna seg til tíðindabræv frá Heilsustýrinum. |
| Grafiskar myndlýsingar (illustratiónir) | -Interaktivar grafiskar illustratiónir (stabbar, sirkul, linjur) ala hagstova.fo ”Nýggjastu tøl”<br>- Smittutøl – grafisk illustratión ala: https://statistik.ssi.dk/ |
| Savn við frágreiðingum (rapportum) | Frágreiðingar (rapportir) við leitifunku (savn av øllum frágreiðingum hjá stovninum) ala https://www.sst.dk/da/udgivelser#/side-1<br>Faldararnir skulu kunna lesast á snildfon, og tað skal vera lætt at prenta faldarar út í snøggum formati. |
| SoMe | Heimasíðan skal kunna leinkja væl sosialar miðlar so sum Facebook, Instagram og LinkedIn. |
| Video | Heimasíðan skal kunna vísa t.d. Youtube-klipp. Tá brúkarin deilir síðu frá heimasíðuni fylgir mynd og tekstbrot við. |
| Oyðubløð | Møguleiki skal vera fyri skipan við oyðibløðum til samskifti millum stovn og borgara. |
| GDPR & Cookies | Skipanin skal handfara cookies. Brúkarin góðkennir. Síðan skal lúka øll GDPR-krøv. |
| Hagtøl um nýtslu | Vit vilja hava hagtøl fyri vitjandi á heimasíðuni, t.d. Google Analytics. |

| | |
|---|---|
| Hýsing | Skal vera í Føroyum. |
| Vegleiðing og undirvísing | Við í loysnini er vegleiðing og undirvísing av umsitarum av heimasíðuni. |
| Tímaprísur fyri víðarimenning | Við í tilboðnum vilja vit hava ein tímaprís fyri 50 tímar víðarimenning fyrsta árið. |

## Snið og brúkaraflati

Upplagt er at hyggja at heimasíðuni hjá danska Sundhedsstyrelsen, sum eisini hevur tvíbýtið millum inngongdirnar: borgari og fakfólk. www.sst.dk.

## Innihald

Ein góð fatan av innihaldinum, sum skal vera á heimasíðuni fæst fæst við at vitja serliga www.sst.dk, men eisini hinar donsku síðurnar, sum eru nevndar undir "Samanrenning og nýbygging". Heimasíðan fer at vera lutfalsliga "tung", tvs. at hava nógvan tekst, og neyðugt er at hava møguleikan at leggja nógvar undirsíður undir hvørt evni/øki.

## Tekstur

Heilsustýrið framleiðir tekstirnar.

## Tíðarætlan

Síðan skal vera úti uml. 1. des 2024.

## Veitari

Heimasíðan verður boðin út á Keypsportalinum.